

*Eg tendraði eina ferð sjónvarpið, har ein sending var um mastrarhvalir. Enska navnið fyri mastrarhvalin er ORKA. Mær dámdi so væl navnið, og tí eitur bólkurin ORKA. Mær dámar væl, at orðini hava ein dupulttýdning, og so tað, at tað visuelt er vakurt, sigur Jens L. Thomsen Mynd: Jens Kristian Vang*

fingið góð ummæli í ymiskum bløðum, og so hava vit gjørt eina lisensavtalu við Ici D'ailleurs, sum gevur teimum loyvi til at útgeva okkara tónleik við teirra logo prentað á. Hetta felagið ger eitt stórt arbeiði við at útbreiða tónleik, serliga í Frankaríki, Italia, Týsklandi, Grikkalandi, Japan og USA. Franski tónleikarin, Yann Tiersen, sum vit spældu samam við í summar, hevur eisini hjálpt okkum væl. Hann skal aftur við á konsertferð í summar, tá vit fara til Danmarkar, Íslands, Póllands, Kekkia, Eysturríkis, Sveis, Týsklands og kanska Italia.

Fjósarokkurin hjá ORKA hevur vunnið bólkinum positiv ummæli og góðar avtalur, og er bólkurin komin langt síðan fjóskonsertina fyri góðum trimum árum síðan. Í øllum førum eru konsertavtalur fyri bæði summarið og heystið longu í hús, og er áhugin frá útlendskum miðlum so stórur, at teir ferðast langt fyri at hitta ORKA í sínum heimliga umhvørvi.

## Stríðið er reinsandi fyri listina

Sum bóndasonur og annars ein vanligur drongur, lá tá tað ikki fremst í huganum, at gerast tónleikari. Tann avgerðin varð ikki tikin fyrr enn fyri seks árum síðan, tá hann fór til London at útbúgva seg innan ljóðtøkni.

- Eg umhugsaði faktisk at gerast bóndi eina ferð, men droppaði tað. Tað nærmasta eg nú komi til at gerast bóndi, er at gera basspelar, sigur hann flennandi.

Jens L. Thomsen hevur eisini eina bakgrund sum listafólk, har hann serliga fekst við myndlist. Seinni gjørdist hann partur av Clickhaze, og í 2003 flutti hann til London at ganga á tónleikaskúla.

- Eg haldi, størstu orsøkina til at eg valdi at konsentrera meg meira um tónleikin var, at tá eg fekst við myndlist, avgjørdi eg sjálvur hvussu endaúrslitið sá út, meðan við tónleiki ert tú ofta í einum samanhangi, har tú mást skapa saman við øðrum menniskjum. Eisini verður tú konstant settur upp á prøva, og mást ofta berjast fyri tínum hugskotum. Mær dámar væl tann partin, stríðið, tað er á ein hátt reinsandi fyri listina. Tað sker alt feittið burtur. Men einamest er tað munurin á at sita einsamallur, og tað at skapa og framføra saman við øðrum menniskjum, ið hevur týdning fyri meg, og er orsøk til at eg havi valt tónleikin.

**ORKA er:**
Jens L. Thomsen, Bogi á Lakjuni, Jógvan Andreas á Brúnni, Ólavur Jákupsson, Kári Sverrisson, Magni Højgaard, Yann Tiersen, Jón Tyril, Niels L. Thomsen

## »Other« passar væl til mín

ORKA er hóast sítt undarliga skap ikki nøkur døgnfluga. Tvørturímóti hevur høvuðsheilin handan ORKA stórar ætlanin um at halda fram við at menna ORKA, listarliga úttrykkið og ljóðførini. At gera fleiri verkætlanir við bólkinum. Fyri Jens L. Thomsen er tað er ein avbjóðing at skapa ljóð úr einum stað og við amboðum, sum einki hava við ljóðframleiðslu at gera. Hann er so smátt farin at spæla sær við tankar um hvar næsta verkætlan skal fara fram.

- Eg havi eitt hugskot til hvar tað skal vera næstu ferð, men tað broytist alla tíðina. Eg kann ikki siga, júst hvat tað er, sum gevur mær íblástur, men eg veit, at eg vil blíva forelskaður í tí, sum eg geri. Íblásturin er ofta ein avspegling av øllum øðrum eg takist við, tað er akkurát sum ein paralell til lívið. Umvegis tónleikin fái eg alt út. Alt, sum eg trúgvi, ivist í, ikki skilji, irriterist inn á, gleðist um

- Tað hevur eisini við sær, at eg ofta geri alternativan tónleik. Tá eg verið biðin um at upplýsa tónleikasjangru, skrivi eg altíð "other". Og tað er ein stílur, sum passar mær fínt. Tað er ein samanrenning av world, rock, electro, ein fusión av øllum.

## List er mítt mál

Í stovuni Innan Glyvur, saman við rokaðu bókahillunum við bókum og plátum – hann lurtar helst bert eftir plátum í staðin fyri fløgum – stendur eisini gittarin, sum var tann fyrsti hann nart við, sum 12 ára gamal. Í hesi stovuni koma hugskotini til verðina, og her arbeiðir hann saman við praktikantinum hjá sær.

- Her er góður arbeiðsfriður og góðar umstøður, og her havi eg mítt egna lítla upptøkuhøli. At vera úti á bygd, sum her, er gott fyri høvdið og konsentratiónina, og tað er deiligt. Onkuntíð kundi eg hugsað mær at havt nakrar seyðir gangandi. Teir kundu í stóran mun passa seg sjálvar, meðan eg eri uttanlanda. Ikki sum við neytunum, sum mann hevur ábyrgd av millum 5-21.00 hvønn dag, sigur hann, og gevur eina fatan av, at hann veit, hvat hann tosar um.

Jens L. Thomsen fekk her fyri ein bít av stóru køkuni, tá Mentanargrunnurin lat starvsløninir til listafólk. Hann søkti upprunaliga um at fáa starvsløn í eitt ár, men fekk játtaða starvsløn í hálvt ár. Pengarnir gera stóran mun, og geva møguleika fyri at arbeiða við hugskotum, uttan at stúra fyri hvar næsta lønin skal koma frá. Fyri Jens L. Thomsen er tað kortini listin, ið stendur fremst, tá um tað at skapa ræður.

- Tað er í stóran mun hetta serliga samskiftið millum tónleikarar, ið heldur huginum uppi, haldi eg. Tað eru ótømandi møguleikar. Men sjálvandi er tað eisini skapanarhugurin, ið er høvuðsdrívmegin. So langt aftur eg minnist, havi eg altíð havt áhuga í list, eisini sum kommunikatiónsform. List er eins og eitt mál, ið tú lærir at brúka betur og betur; og onkuntíð kanst tú lýsa øki, ið ikki kunnu lýsast við orðum, hugleiðir Jens L. Thomsen um passiónina fyri at arbeiða við tónleiki, sum her fyri vann honum eitt hálvt ár uttan pengasorgir.